# Jólakonsert við Alex Bærendsen

Tað verður nostalgi fyri allar pengarnar á árligu jólakonsertini fyri føroyingum í Århus leygarkvøldið kl. 21. Tá fer føroyska sangstjørnan Alex Bærendsen at syngja og spæla jólaløg í Áarstovu. Alex Bærendsen hevur ikki havt almenna framførslu fyri føroyingum í hálvt annað ár. Alex Bærendsen við jólaløgum í skjáttuni verður ikki minni forkunnugt, hetta hava føroyingar ikki hoyrt í mong ár. Umframt Alex Bærendsen fer kórið í Århus at framføra nakrar jólasangir, áðrenn Alex Bærendsen og klaverleikarin Axel Eysturstein trína á pallin. Møguleiki verður eisini at hoyra aðrar klassikarar frá rúgvusmiklu goymsluni hjá manninum við bergtakandi røddini.




# Skandia eitur nú Eik

SkandiaBanken, sum Eik keypti fyrr í ár, hevur nú eisini skift navn. Navnið Eik verður nú eisini nýtt um bankan, sum við sínum 115.000 viðskiftafólkum er størsti internetbankin í Danmark. - Vit rokna við, at samlaðu tilboðini frá fyrrverandi SkandiaBanken og Eik Bank Danmark gerast ein fyrimunur í kappingini um kundarnar á danska marknaðinum, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka P/F og nevndarformaður í Eik Bank Danmark A/S.

# Stórt veiðivirði og stórar ísfiskalastir

**Sambært keldum hjá Sosialinum setti djúpvatnstrolarin Steintór í Hvalba met í veiðivirði, veitt av djúpvatnstrolara í føroyskum sjógvi, tá ið teir landaðu og seldu veiðina á Tvøroyri fyri tilsamans 2,45 miljónir krónur**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta mikudagin landaði djúpvatnstrolarin Steintór á Tvøroyri. Hetta var ein rættiligur roktúrur, og sølan hjá skipinum setti met millum djúpvatnstrolarar, sum fiska í føroyskum sjógvi.

Veiðan hjá skipinum vá 240.000 pund, meginparturin var toskur og kongafiskur, sum skipið hevði fingið vesturi á Íslandsrygginum og vestarliga í føroyskum sjógvi.

Tað vóru feløgini Delta Seafood og TG Seafood, sum keyptu veiðina fyri heilar 2,45 miljónir krónur.

Keldur hjá Sosialinum siga, at hetta soleiðis er størsta søla hjá einum føroyskum djúpvatnstrolara eftir roynd í føroyskum sjógvi.

Túrurin hjá Steintóri vardi í eina viku, og skipari hendan túrin var Jákup Pauli Hammer.

### Stórar ísfiskalastir

Nógvar ísfiskalastir hava verið størri – og nógv størri - enn lastin hjá Steintóri á nevnda túri, serliga í tí tíðini, tá ið skipini ikki høvdu fiskin í lastini í kørum, men í krubbum.

Í fyrrhelvtav áttatiárunum – 1983, 1984 og 1985 – vórðu nógvar velduga stórar lastir landaðar til føroysku fiskavirkini.

Sosialurin hevur soleiðis frætt um eina last hjá djúpvatnstrolaranum Rock Amadour, sum vigaði yvir 500.000 pund.

Húsvíkingurin, Søren Sørensen, sum tá var virkisleiðari á Bátafiski á Strondum, váttar, at Rock Amadour við Jóhannusi Poulsen, sála, sum skipari á nevnda túri hevði meira enn 250 tons ella yvir 500.000 pund. Hann heldur, at hetta var í 1984 ella 1985.

- Um sama mundið landaði Suðringur eina last á Tvøroyri, sum var nøkur kilo størri og sigst vera størsta ísfiskalast, sum landað er í Føroyum av føroyskum skipi, sigur Søren Sørensen.

Mortan Johannesen, Mortan hjá Andriasi, var skipari á Suðringi um hetta mundið.

### Lágur fiskaprísur

– Upsin var ikki nógv verdur miðskeiðis í áttatiárunum, og tí kann tann prísur, sum skipini fingu fyri fiskin tá, ikki samanberast við fiskaprísirnar í dag, sigur Søren Sørensen.

Hann vísir á, at slíkar lastir, har fiskurin varð ísaður í krubbur – og ikki í kør ella kassar – ikki vóru tað sama til dygdar sum í dag.

– Kortini bar til at fáa fiskin undan við hampiligum úrsliti, sigur fyrrverandi virkisleiðarin.



*Sambært keldum hjá Sosialinum hevur djúpvatnstrolarin Suðringur við Mortani Johannesen sum skipara ført størstu ísfiskalastina til lands, sum nakrantíð er landað í Føroyum. Men Rock Amadour liggur beint aftanfyri í nøgd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Lærararnir í Fuglafiði:

# Fáa farteldur og elektróniskar talvur



*- Býráðið vil við hesum stuðla øllum pørtum í skúlaumhvørvinum og verða við til at lyfta teirra førleikar á hesum øki upp á eitt hægri støði, sigur Dánjal Vang, býráðslimur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Samskifti millum læraran, skúlan, næmingin og heimið kemur sum frá líður at verða eitt elektróniskt samskifti, sigur Dánjal Vang, lærari og býráðslimur í Fuglafirði**

SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fuglafjarða býráð samtykti á býráðsfundi í síðstu viku, at allir lærarar við Fuglafjarðar skúla skulu fáa farteldu.

Men lærararnir fáa meira enn farteldur í hesum umfari. Teir fáa eisini elektróniskar talvur at brúka í frálæruni.

Í síðstu viku vóru lærararnir í Fuglafjarðar skúla soleiðis á skeiði í Klaksvík, har teir vórðu kunnaðir nærri um brúk av elektróniskum talvum.

### Býráðið vil stuðla

- Samskifti millum læraran, skúlan, næmingin og heimið kemur sum frá líður at verða eitt elektróniskt samskifti, sigur Dánjal Vang, lærari og býráðslimur í Fuglafirði.

Hann vísir á, at við hesum í huga vil býráðið stuðla øllum pørtum í skúlaumhvørvinum og verða við til at lyfta teirra førleikar á hesum øki upp á eitt hægri støði.

Býráðið hevur soleiðis játtað pening bæði til keyp av farteldum og elektróniskum talvum.

### Ein miljón til skúla

Á nevnda býráðsfundi í Fuglafjarðar kommunu samtykti býráðið eisini at játta eina miljón krónur til projektering av nýggjum stovum/skúla.

- Ein av fyrstu døgunum fara lærararnir og býráðslimirnir á fund at tosa um ymisk skúlaviðurskifti í kommununi, sigur Dánjal Vang, býráðslimur í Fuglafirði.